## DAGSINS MEINING

# Eitt land fyri øll

- Eitt land fyri øll! Tað ljóðar so sjálvsagt, sum nakað, ið øll eiga at kunna taka undir við. Men hvussu sær veruleikin út? Í farna vikuskifti hevði Javni landsstevnu, har eitt evni var *At menna menningartarnað*. Heildarmyndin, ið ein fekk av stevnuni var, at vit enn ikki hava eitt land fyri øll. Her manglar heilt nógv í, tá vit hugsa um tey menningartarnaðu. Síggja vit hinvegin gongdina yvir eitt longri tíðarskeið t.d. tey seinastu fimti árini, eru vit ivaleyst komin langt. Tann stóri spurningurin her og nú er, hvørji útbúgvingartilboð kann samfelagið veita teimum menningartarnaðu. Talan er um at byrja við einum eftirskúla, og verður í fyrsta umfari talan um eina roynd. Hetta er eitt gott tiltak.

Tey menningartarnaðu hava somu rættindi sum øll onnur í samfelagnum. Hetta merkir, at tey eiga rætt til útbúgving, arbeiði og bústað. Hetta gerst ikki uttan at settar verða á stovn serskipanir, har lagt verður upp fyri tí veruleika, at hesir samfelagsborgar ikki megna tað sama, sum tey, ið ikki eru menningartarnað.

- Vit skulu hava fjølbroytt tilboð, segði landsstýrismaðurin – ikki ein ella tveir kassar. - Vit skulu fjølbroyta samfelagið ikki einstreingja tað, legði hann afturat. Púra rætt! Tað er væl eingin, sum er ósamdur. Men sum stjórin á sernámsdeplinum vísti á, er alt hetta ein spurningur um pening. Vit hava tann góða viljan, vit hava tey útbúgvnu fólkini til tað góða endamálið, vit hava foreldur og menningartarnað, sum vilja samstarva. Men tey vøkru orðini og tann góði viljin er ikki nóg mikið. Her mugu gerðir fylgja orðum! Samfelagið má og skal seta tær neyðturviligu upphæddirnar til taks, annars er alt hetta til fánýtis. Tann júst samtykti eftirskúlin fyri menningartarnað er eitt gott stig framá, og samtyktin bindur løgting og landsstýri til at játta, tað, sum skal til. Men framvegis er stórt trot á tilboðum til menningartarnað úti kring landið. Har trýtur arbeiði, har trýtur bústaður og har tróta útbúgvingartilboð. Allir flokkar á tingi eiga at taka lógvatak saman, so karmarnir fyri menning av menningartarnaðum kunnu gerast so góðir at Føroyar gerast eitt land fyri øll.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Er ÚF við til at undirgrava demokratiið?

**Marjus Dam**
*tingmaður*



Spurningur til Útvarp Føroya: Er ÚF við til at undirgrava demokratiið?

Gjørdist ikki sørt skelkaður ein dagin. ÚF skuldi hava politiska sending um ríkisveitingina. Upplýst varð, at hendan skuldi vera kl. 19 sama dag. Áhugavert, hugsaði ein.

Men sendingin gjørdist eitt satt vónbrot. Tí av ókendari orsøk, varð størsti andstøðuflokkurin als ikki boðin við til kjaksendingina. Úrslitið av kjaksendingini var eisini hareftir.

Ein situr eftir og spyr, hvussu slíkt veruliga kann koma fyri í okkara sokallaða demokratiska samfelagið. Eisini spyr ein, um ÚF ikki hevur misskilt sína uppgávu, tá slíkt kann koma fyri. Tí hvør er frágreiðingin til, at Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin, Javnaðarflokkurin verða bodnir til kjak, tá størsti flokkurin, Sambandsflokkurin, ið veruliga hevur nakað at geva hesum kjaki, als ikki er tilstaðar. Hesin flokkur, ið umboðar nærum 30 % av veljaraskaranum?

Eg havi tí nakrar spurningar til útvarpsstjóran:

1: Hví varð Sambandsflokkurin tilvita settur uttan fyri kjaksendingina hendan dagin?

2: Er tað fyri at leggja loka á ein týðandi bólk av føroyingum, ið hava eina aðra áskoðan enn ávísur journalistur, ið vil halda hesa hugsan og argumentini fyri hesi burtur frá almenna kjakinum?

3: Hevur útvarpsstjórin tikið stig til, at slíkt álop á demokratiið ikki sleppur at halda fram við hjálp av ávísum starvsfólki á Útvarpi Føroya?

# Postverkshúsajarðarferðarpolitikkur

**Niklái Petersen**
*løgtingsmaður*



Í endamálsorðingini hjá Postverki Føroya stendur í § 1 stk. 2 millum annað, at vera tænastuveitandi stovnur, og í so stóran mun sum gjørligt rikin út frá handisligum sjónarmiðjum, at laga seg eftir menning samfelagsins og átaka sær víðkað virksemið, tá ið viðurskiftini tala fyri tí.

Ì Norðstreymi fellur hamarin tíðum, tá um niðurlegging av posthúsum og landpostboðum ræður.

Posthúsið í Hvalvík varð niðurlagt fyri fleiri árum síðani, og fingu tey landpostboð í staðin, hetta eftir avtalu við Postverk Føroya, og vóru fólk yvirhøvur væl nøgd við hesa skipan.

Annars kundu tey avgreiða síni postørindir norðuri á Oyrarbakka ella aðrastaðni. Sama var galdandi fyri Saksun, Tjørnuvík og Haldarsvík.

Í Hósvík hevur landpostboð verið í fleiri ár, og hevur tað virkað væl, men so er ikki longur.

Í vár komu harraboð sunnan úr Havn, at landpostboðið varð niðurlagt í Hvalvík og Hósvík og tey, ið høvdu postørindir kundu avgreiða síni viðurskiftir á Oyrarbakka ella suðuri í Kollafirði ella aðrastaðni.

Eftir at Heðin Zachariasen reisti muntligan fyrispurning í tinginum herfyri um niðurlegging av landpostboðunum í Hvalvíkar og Hósvíkar kommunu fyrr í vár, kom fram, at hettar var ein liður í einari framtíðar rationaliseringsætlan hjá Postverki Føroya.

Inni á Toftum varð boða frá fyri páskir, at har skuldi posthúsið lata aftur, men hetta funnu fólk á staðnum seg ikki í, sum rímiligt var.

Úrslitið av hesum mótmælum var at landstýrismaðurin broytti avgerðina hjá Postverkinum, og posthúsið á Toftum er opið aftur, sum vanligt.

Altso, um bara nóg nógv fólk mótmæla, so broytist avgerðin. Hetta tykist vera ein sera løgin framtíðar rationaliseringspolitikkur hjá Postverki Føroya.

Nú eru Postverkshúsajarðarferðarpolitikkurin komin til Kvívíkar, Leynar og Stykkið, posthúsið afturlatið og onki í staðin. Avgreiðið tit tykkara postørindir í grannabygdunum.

Løgin hugsunnarháttur og arbeiðsháttur fyri eina almenna fyritøku, hvørs endamál er at vera tænastuveitari fyri landsins borgarar, og at vera ein mennandi stovnur fyri land og fólk.

Postverksstjórin átti at havt annað endamál við sínum stovni enn at jarða alt, ið er minni enn eitt ávíst, uttan at koma við nøkrum ístaðin.

Tað er ongin loyna, at nógv er broytt í okkara samfelagi seinastu árini, sambandið er gott millum oyggjarnar og alnótin vinnur meira og meira innpass hjá tí vanliga fólkinum, men tað er ikki øll, ið hava henda møguleika minni enn so.

Í Norðstreymi hava vit merkt niðurskerjingina serliga nógv seinastu árini, og eru fólk sera fortørnað um hesi viðurskifti.

Um nakar sum helst vilji er til staðar, so mátti tað kunna latið seg gjørt, at fólk kundu avgreitt síni postørindir eftir tørvi ella eftir avtalu við postboðið úti á bygdunum.

Um Postverk Føroya onki annað hevur í ermuni enn at lata posthús aftur og niðurleggja landpostboðið, so er bara at snara lykilin um á Postverki Føroya og grýta hann langt vekk, so ongin finnur hann aftur.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Avsannan

**Tormóður Djurhuus**



Í grein á baksíðuni á Oyggjatíðindi fyri mikudagin tann 23. í h.m. undir heitinum »Risin longu fingið hjálp«, verða m.a. bornir fram hesir faktuellu upplýsingar.

1) »Hetlendingar settu frá byrjan av 50 milliónir í skipið. Nú hava teir so aftur spýtt í kassan. Hvussu nógv hetlendingar samanlagt hava sett í er fyribils ein loyna«.
2) »Ein sannroynd er tað í hvussu so er, at Mr. Morgan, sum situr á Hetlendsku oljumilliónunum, skrivaði undir nøkur loynilig skjøl, áðrenn sáttmálin endaliga varð undirskrivaður av Smyril Line og skipið yvirtikið. Mr. Morgan tryggjaði Smyril Line, at skipið kundir yvirtakast«.
3) »Men ikki nokk við hesum. Helendingar hava eisini tryggjað raksturin av nýggju Norrønu í trý tey fyrstu árini…«

Vit í P/F Smyril Line ógvast við, at slík tíðindi verða borin út til almenningin, tí hetta eru ikki bert rong tíðindi, men eru hetta upplýsingar, sum eru tiknir beinleiðis burturúr leysari luft.

Verður hervið boðað frá hesum.

# Stevna fyri ættina í Túni á Toftum

TÍÐINDASKRIV!

Sum kunnugt er ættin eftir Hanus (yngra) og Jóhonnu í Túni á Toftum fjølment í Føroyum og eru enntá ættarfólk av hesi ætt í Íslandi, eftir dóttir teirra, Susanne og í Noreg eftir syni teirra Joen, kallaður Tofta Jógvan.

Ættargreinirnar í Íslandi og Noreg sýna stóran áhuga at koma higar í summar fyri at heilsa uppá skyldfólkini í Føroyum.

Ættarfaðir okkara, Hanus og sonur hansara Tummas sjólótust tann 30 apríl 1870 tá bátur teirra „Duen" gekk burtur við 5 monnum - eystanfyri Eystnes.

Børn Hanusar og Jóhonnu (9) vóru:

| | |
|---|---|
| 1. Hanus Hansen | ógiftur Toftir |
| 2. Tummas Hansen - 1870 | giftur v/Juliu Toftir |
| Tey fingu 1 dóttir | Thomina (gift til TórshavnarHavnar) |
| 3. Susanne Hansen | gift v/ Joen Petur Tórshavn (fyrra gifta) |
| Tey fingu 1 dóttir | Hansina giftist á Vopnafjørðinum í Íslandi |
| 3. Súsanna Hansen | gift /v Niclas Jacob, Skipanes, (seinna gifta) |
| Tey fingu 1 dóttir | Katrina Maria, ógift |
| 4. Joen Hansen | giftur v/ Anne Greta (Húsar) Tórshavn |
| Tey fingu 1 dóttir | Johanne giftist til Stavanger, Noreg |
| 5. Anna Maria | gift v/ Joen Jacob Joensen, Húsar |
| Tey fingu 6 børn: | Clement, Johanne, Rakel, Hanus, Katrina og Thomina |
| 6. Justines Hansen | gift v/ Katrinu Toftum |
| Tey fingu 8 børn: | Billa, Hanus, Elisabeth, Andrias, Jóhannus, Anton, Tummas Juul og Karl |
| 7. Johanne | gift v/ JóanisLind, Svínoy |
| Tey fingu 6 børn: | Elspa Sofie, Jóhanne Sofie, Pól, Hans, Sigga, og Tummas |
| 8. Hanus Hansen | giftur v/ Elisabeth, Æðuvík |
| Tey fingu 3 børn: | Magnina, Óla hans og Johanne Sofie |
| 9. Jóhan Hansen 1867-1960 | giftur v/Mette Manelle, Nes |
| Tey fingu 7 børn: | Hans Jacob, Peter Hans, Tummas Johan, Anna Kristine, Olaf, Margretha og Henrikka |

Ættarstevnan verður í Ítróttarhøllini á Skála Fríggjadagin 25 juli 2003-04-24

Eftirkomarar íð ynskja at luttaka, verða at tekna seg hjá einum av niðanfyri nevndu, í seinasta lagi fríggjadagin 4 juli 2003

Veitslan er avmarkað til børn og barnabørn hjá nevndu syskinabørnum við maka. Talan er soleiðis um eina trímenninga og fermenningaveitslu.

Vegna fyrireikararnir:

Eftirkomari eftir Tominu:
Jóhannus Rubbeksen Tórshavn, tel 312341
Eftirkomari eftir Onnu Mariu
Elinborg Solmunde, Syðrugøta tel 441438
Eftirkomari eftir Justines
Josefina Jacobsen, Saltnes tel 447438
Eftirkomari eftir Johanne
Flóvin Jacobsen, Velbastað tel 328001
Eftirkomari eftir Hanus
Jovina Højgaard, Tórshavn tel 312755
Eftirkomari eftir Johann
Emil Hansen, Nes tel 447178

# Oljulondini uttan fyri OPEC fáa størri týdning

**Tað verður ikki OPEC, sum fer at nøkta tann veksandi eftirspurningin á oljumarknaðinum, men heldur onnur oljulond. Tað heldur norski oljumálaráðharrin**

OLJUMARKNAÐUR
*Árni Joensen*

Altjóða orkustovnurin IEA hevur júst almannakunngjørt eina framtíðarmeting av oljumarknaðinum. Har kemur stovnurin til ta niðurstøðu, at í 2030 fara 42 prosent av oljuni á altjóða marknaðinum at stava frá londunum í Miðeystri. Í dag koma 28 prosent haðani.

Men hesum er norski oljumálaráðharrin, Einars Steenanæs, als ikki samdur í. Hann sigur tvørturímóti, at veksandi framleiðsla í londum uttan fyri OPEC fer at seta OPEC-londini í eina verri støðu, enn tey nakrantíð hava verið í seinastu nógvu árini. Einar Steenanæs sigur, at søgan hevur prógvað, at tað eru ikki OPEC-londini, sum nøkta eftirspurningin, tá hesin veksur, men haraftur-ímóti lond, sum eru uttan fyri felagsskapin.

Norski oljumálaráðharrin heldur tí onga orsøk vera til at stúra fyri, at ídnaðarlondini verða ov bundin at OPEC-londunum, og hann heldur lítið um framtíðarmetingina hjá IEA.

- Søgan hevur víst okkum, at IEA hevur mistikið seg fyrr, og tað er skeivt at halda, OPEC fer at fáa so got tak á heimsmarknaðinum, sum stovnurin sigur. OPEC-londini framleiða ikki meiri olju í dag enn í sjeytiárunum. Tann størsti vøksturin er í londum uttan fyri felagsskapin, sigur Einar Steenanæs.

# Ársins songrødd

TÍÐINDASKRIV

4. umfar í tiltakinum Ársins Songrødd, sum er fyri Eysturoynna, verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið kl.23:00 tann 3.mai. Aftaná verður DJ-show, lasershow og freestylerskapping. Tað eru teir báðir Martin Kjærbo Og Jákup Jacobsen, sum skipa fyri. Jákup skal harumframt saman við Ragnhild Ellingsgaard vera frásøgufólk, tá ið Ársins Songrøddkappingin fer fram. Bussar koyra til og frá staðnum í sambandi við tiltakið.

# Nýggj nevnd í BLF

TÍÐINDASKRIV

BLF, Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, hevur havt aðalfund, og nýggj nevnd varð vald. Í henni sita Atli Leo, Esther Dahl, Hans Ellefsen og Niels Winther, sum halda áfram í nevndini, og Durita Eliasen og Sigurð Ó. Vang, sum eru nývald. Úr nevndini eru farnir Bergur Berg og Hilmar Høgenni. Nevndin hevur nú skipað seg við Niels Winther sum formanni, Esther Dahl sum nevndarskrivara og Atla Leo sum kassameistara.

# Stórt familjutiltak í Argja Skúla

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 3. mai millum kl. 14 og 17 verður møguleiki hjá børnum og vaksnum at koma ein túr á Argja Skúla og hugna sær við alskyns aktivitetum.

Tað er harmoniorkestrið og guitarbólkurin hjá Tórshavnar Musikkskúla, sum skipar fyri familjutiltakinum. Peningurin, sum inn kemur, fer til at fíggja eina ferð til Íslands í tíðarskeiðinum 25. til 29. juni, har orkestrini skulu luttaka í eini norðurlendskari tónleika- og musikkskúlastevnu.

Á tiltakinum á Argja skúla verður ymist til hugna og stuttleikar. Nevnast kann køku- og mattombola, burturlutting, bommtombola, fiskibrunnur, klatriveggur, skeiðirør og hoppiborð. Eisini verður kaffi og heitar vaflur til keyps.

Kl. 15.30 fara tey ungu í harmoniorkestrinum og guitarbólkinum at spæla.

Tað er Nordisk Musikskoleråd, sum skipar fyri stevnuni í Íslandi í summar, sum verður hildin í Kópavogi. Børn og ung úr øllum Norðurlondum eru bjóðað við til stevnuna.

Evnið á stevnuni verður íslendska náttúran og mentan. Luttakararnir framføra sín tónleik ymsastaðni og spæla saman. Eisini verða útferðir gjørdar.

Tórshavnar Musikkskúli luttekur við tveimum bólkum. Einum harmoniorkestri við 42 luttakarum og einum guitarbólki við 10 luttakarum.

Savnandi parturin av stevnuni er eitt stórt tónleikaprojekt, har ið allir næmingarnir úr Norðurlondum, við teirra ymsu tónleika- og mentunarbakgrundum, fara at skapa og framføra tónleik saman. Tónleikaliga úrslitið verður til í samarbeiði við næmingar og leiðarar meðan stevnan er. Listerligur leiðari av hesum tiltaki verður Paul Griffiths, sum er tilknýttur Guildhall Scool of Music and Drama í London.